Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Trolfiskiskapur eftir svartkalva

Spurningar:

1. Hava Føroyar størstu trolmeskavídd í Norðuratlantshavi, tá tað snýr seg um fiskiskap eftir svartkalva?
2. Hví hava Føroyar valt hesa trolmeskavídd til henda fiskiskap?
3. Hví brúka tey ymsu londini ymiska meskavídd til henda fiskiskap?
4. Ætlar landstýrismaðurin at taka hetta upp við Havstovuna, soleiðis at føroyingar hava betri treytir at fiska svartkalva, serliga har fiskað verður av sama svartkalvastovni, báðumegin markið?

Viðmerkingar:

Tað eru fáar felagstreytir um meskavídd innan trolfiskiskap í Norðuratlanshavi. Hetta hóast londini ofta fiska av sama fiskastovni. Sum skilst, skipa londini sín egna fiskiskap við egnari trolmeskavídd. Tað ger, at fortreytirnar eru ymiskar fyri ymisku skipini.
Tað hevur verið víst á, at Føroyar hava størstu meskavídd (145 mm), tá fiskað verður eftir svartkalva. Grundgevingarnar eru helst fleiri. Hinvegin nýta bretar 135 mm, norðmenn 135 mm og grønlendingar 140 mm, tá fiskað verður eftir svartkalva.
Nú eru fleiri lond, sum gera royndir við skiljirist, soleiðis at hjáveiða verður skild frá. Hetta ger fiskiskapin burðardyggari.
Støðan í dag er tann, sambært skiparum, sum troyta henda fiskiskap, at svartkalvin, við 145 mm meskavídd, sleppur gjøgnum posan, men tíverri fær nógvur fiskur skaða og doyr, hóast hann sleppur ígjøgnum meskarnar. Tá er onki vunnið. Varð meskavíddin minkað, fiskaðu skipini eisini tann fiskin, sum í dag doyr uttanfyri trolið.
Tað kann eisini tykjast undarligt, at føroysku skipini fiska við størri meskavídd eftir sama fiskastovni, har bretar fiska við smærri meskum nakrar fáar metrar hinumegin markið.
Fyri at vita, hvat landstýrismaðurin kann gera við hetta málið, og hvør støða hansara er í hesum máli, verður hesin fyrispurningur settur landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 25. februar 2025

Jóhannis Joensen